Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Suðurpólurin bráðnar



Granskarar hjá amerikanska rúmdarfelagsskapinum NASA ávara nú um, at ísurin í Antarktis bráðnar so skjótt, at havið kann fløða 2,5 metrar fram til 2100. Fylgisveinaeftirlit seinastu 10 árini vísir, at ísurin bráðnar við stórari ferð. Bara í 2006 bráðnaðu 192 milliardir tons av ísi.

- Tað er eingin ivi um, at ísurin í Antarktis minkar støðugt ár eftir ár, sigur Eric Rignot, granskari hjá NASA.

Um havið fløðir við tveimum metrum ella meira, so merkir tað, at nógv økið fram við heimsins strondum fara at liggja undir í vatni – og at heimurin fer at uppliva eitt nýtt slag av flóttarfólki, sum flýggjar undan havinum.

# Vandamikil ferðamál



Tíðarritið Forbes hevur gjørt ein lista við teimum 10 vandamiklastu ferðamálunum í heiminum, og hesaferð eru Føroyar ikki sloppnar upp í part.

Vandamiklasta landið í heiminum at ferðast til í løtuni er Somalia. Eftir tað koma krígsherjaðu londini Irak og Afghanistan. Hini londini, sum eru komin á listan hjá Forbes, eru Haiti, Pakistan, Sudan, Congo, Libanon, Zimbabwe og Gaza-geirin.

# Dani í uppskoti til Oscar



Nú er kunngjørt, hvørjar tilnevningar til Oscar-heiðurslønirnar í ár eru. Fimm sjónleikarar skulu kappast um at virðislønina sum besti manniligi sjónleikari, og ein av teimum er danin Viggo Mortensen. Hinir eru George Clooney, Daniel Day-Lewis, Johnny Depp og Tommy Lee Jones. Tær fimm tilnevndu í bólinum besti kvinnuligi sjónleikari eru Cate Blanchett, Julie Christie, Marion Cotillard, Laura Linney og Ellen Page. Og so kunnu vit nevna, at teir fimm filmarnar, sum eru í uppskoti til at gerast besti filmur, eru „Atonement", „Juno", Michael Clayton", „No Country for Old Men" og „There Will Be Blood".

# Jeppesen misti svøvnin



Danmark hølvaði í týskvøldið Kroatia av í EM í manshondbólti. Ein av donsku spælarunum slapp tó ikki at spæla nakað serligt við. Lars Krogh Jeppesen fekk reyða kortið tíðliga í dystinum, og tað hevði kanska sínar orsøkir. Danska TV2 visti at siga, at Lars Krogh Jeppesen hevði mist svøvnin í Noregi. Hann gav madrassuni skyldina fyri, at hann ikki fekk sovið, og hann var so troyttur dagin fyri dystin, at hann orkaði ikki at venja við liðnum. Jeppesen hevur nú sjálvur keypt sær eina nýggja madrass frá Ikea, og so er at vóna, at hann fær svøvn í eyguni, nú kappingin gongur móti endanum.

# Lohan í vánaligum filmi



Tey, sum ger tilnevningar til Golden Raspberry Awards, ið letur virðislønir til ársins vánaligastu filmar, halda, at filmurin I Know Who Killed Me man vera ársins vánaligasti filmar. Filmurin hevur fingið heilar 9 tilnevningar. Serliga verður sagt, at avrikið hjá Lindsay Lohan í filminum skal verða út av lagi vánaligt, men tað heldur hon ikki sjálv.

- Eg spældi ein skizofren, og tað var sera krevjandi. Leikstjórin fekk meg at spæla soleiðis, sum eg ikki hevði roknað við, at eg kundi klára at spæla, sigur Lohan.